# Eitt sindur um sukursjúkuna í Føroyum.

(A brief report on diabetes in the Faroe Islands).

*Eftir R. K. Rasmussen.*)*

Sukursjúkan verður, tað høvundurin dugir at síggja, fyrstu ferð nevnd í heilsulagslýsingini fyri árið 1877. Landkirurgurin gevur hetta ár ta frágreiðing, at tað eru nakrar sjúkur, sum Føroyar eru «så godt som forskånede for», og teirra millum er sukursjúka. *N. Chr. Lund,* fylkislækni í Suðuroy, ger meira av í frágreiðing síni hetta sama ár, tá ið hann sigur, at sukursjúka er ókend í Føroyum. Men longu í 1883 sigur hægsti embætislækni í Føroyum, at hetta árið var komið «et dødeligt forløbende tilfælde af diabetes mellitus — vistnok det første — på Færøerne». Hesar upplýsingar um sukursjúku í Føroyum eru at finna í teim hondskrivaðu frágreiðingunum. Tær eru ikki komnar við í «Medicinalberetning for Kongeriget Danmark» hesi bæði árini. *N. Chr. Lund*[9] tekur í doktararitgerð síni — prentað 1884 — upp aftur tað, hann segði í 1877. Hann fór úr Føroyum í 1879 og hevur ikki frætt um tilburðin í 1883.

Næsti tilburðurin av diabetes mellitus er at finna í tí óprentaða partinum av heilsulagslýsingini fyri 1904. Har stendur: «Et tilfælde af diabetes mellitus i anledning af livsforsikring».

---

*) Týtt hevur *Jóhannes av Skarði.*

Deyðaváttanirnar fyri árini 1899—1920, bæði ár við, eru hugdar ígjøgnum við atliti til sukursjúku. Men hetta er ikki gjørt við váttanirnar frá 1879 — hetta árið taka hesar váttanir við í Føroyum — til 1898. Fyri fimm fyrstu árini í hesum tíðarskeiði, hava vit, sum omanfyri nevnt, álítandi upplýsingar at øðrum veg. Men tað *kann* vera, at til eru váttanir, har orðini diabetes mellitus ella sukursjúka eru nevnd í 15 ára tíðarskeiðinum 1884—1898. Á váttanunum frá 1899 til 1905 eru hesi orð ikki. Men í 1906 doyði eitt 48 ára gamalt konufólk, sum frá líkskoðarunum hevði fingið deyðaatvoldina sukursjúku, og embætislæknin setti diabetes mellitus aftur at og koyrdi andlátið í bólkin 20.

Næstu ferð orðið diabetes er nevnt í deyðaváttan er í 1909. Tá doyði 27 ára gamalur maður, sum var lagdur inn á sjúkrahúsið í Tórshavn, og sum fekk deyðaatvoldirnar mb. Basedowii, diabetes mellitus, og lagt afturat: vardi í o. u. 5 ár. Eisini hann er taldur upp í bólk 20 í hagtøl-unum um deyð. Triðja andlátið var árið eftir. Tá doyði ein 18 ára gomul genta av sjúkuni. Í váttanini stendur: Dia-betes mell. («Har lidt af denne sygdom i omtrent 2 år. Mors i coma diabet.»).

Frá 1906—1920, bæði ár við, eru, tá ið vit meta eftir deyðaváttanunum, í Føroyum deyð 16 fólk, sum høvdu sukursjúku, tá ið deyðin kom. Í árunum 1907, 1908 og 1917 doyði eingin av hesi sjúku, men í hinum 12 árunum vóru 1—2 andlát hvørt ár. Trý av teim 16 — ♀ 27, ♀ 28 og ♂ 28 ár — høvdu har umframt lungnatuberklar, og henda sjúkan er roknað at vera aðalmeini, sum vit síggja á tí, at embætislæknarnir hava koyrt tey upp í bólk 16 og ikki undir No. 20. Í 1919 doyði 46 ára gamalt konufólk av diabetes mell., bronchopneumonia & bronchitis capill. Við hana er sett No. 13, og tað merkir at sukursjúkan sum deyðaatvold víkur fyri hinum báðum sjúkunum. Tað eru so í tíðini 1906—1920 12 deyð av sukursjúku og har afturat 4, har henda sjúka hevur verið uppií, um ikki beinleiðis deyðaatvold.

Tær føroysku deyðaváttanirnar geva væl virðismiklar upplýsingar um sukursjúkuna; men vit hava kortini varhugan av, at als ikki er nóg mikið at hava tær, vilja vit vita nakað um útbreiðslu sjúkunnar í Føroyum ella í ymsum pørtum av landinum. Ógviliga stórur partur av líkskoðanini í Føroyum til 1920 – og eisini seinni – varð framd av líkskoðarunum, og vit hava orsøk til at halda, at hesir menn hava sett sukursjúku á váttanina, bert tá ið hon beinleiðis hevur verið deyðaatvold.

Í Eiðis læknadømi er sjúkan fylgd við serligum athuga frá 27/6 1920 til 26/6 1952. Til 1920 kenna vit í hesum parti av Føroyum bert ein einasta tilburð við sukursjúku. Hetta var gift kona, sum ikki var fødd í læknadøminum, men eftir giftuna búsettist her. Hon doyði í 1914 40 ára gomul og er ein av omanfyri nevndu tólv, sum doyðu av sukursjúku í árunum 1906–1920. Deyðaváttanin er skrivað av likskoðarum og sigur stutt og greitt, at tað er sukursjúka. Embætislæknin hevur sett afturat: No. 20 og hevur soleiðis góðtikið sjúkuavgerðina.

Í juli 1921 varð høvundurin kallaður til 76 ára gamalt konufólk, sum tá í 40 ár hevði havt sár innantil á vinstra fóti. Landið vísti sukur. Hon slapp nú at eta alt uttan sukur, men minni breyð, og eftir tveimum vikum grøddist sárið og kom ikki aftur. Hon doyði 8 ár seinni av heilabløðing 84 ára gl. Sukursjúka hennara hevur óivað verið ógviliga lin; men sonardóttir hennara fekk í 1939, 26 ára gomul, heldur ringa sukursjúku, og somu lagnu hevði ein 30 ára gomul dótturdóttir ein annan son hennara; sjúka hennara varð funnin í 1942. Hin gamla konan var fødd í Danmark og kom í barnaárum til Føroya. Vit taka hana tí ikki við seinni í hesi grein, og hon kemur ikki uppí teljingarnar.

Fyrsti tilburður av glykosuri – omanfyri nevndi undantikin – sást í 1925. Hetta var maður, føddur í 1895. Skjótt sást, at sjúkan hevði samband við nýruni (glycosuria renalis). Hann hevur síðan ligið 4 ferðir á sjúkra-

húsi fyri tarmalop og aðrar skurðsjúkur. Tær tvær ferðirnar, hann lá á sjúkrahúsinum, varð blóðsukurrannsókn gjørd, – og rannsóknirnar vístu báðar glycosuria renalis. Eingin ivi er tí um, at sjúkuavgerðin er bein og hann verður sjálvandi ikki taldur upp í diabetes mellitus.

Sukursjúkan sást í omanfyri nevnda tíðarskeiði fyrstu ferð í 1931 – undan tiknir fyrr nevndu tilburðir, sum funnir vóru í 1921 – aðru og triðju ferð í 1934 og 1935. Í 1932–33, 1936–37, 1940–41, 1944 og 1951–52 komu eingir nýggir tilburðir, men øll árini í millum hesi nevndu 1–2 tilburðir á hvørjum ári – tilsamans 17 tilburðir í árunum 1931–$^{26}/_{6}$ 1952, t. e. nærum 1 tilburður um árið.

Av hesum 17 tilburðunum av sukursjúkum vóru 6 mannfólk og 11 konufólk. Tann yngsti var 22 ár, tann næstyngsti 26 ár, tá komið var fram á sjúkuna. Aldurin síggja vit á 1. talvu:

*1. talva. Aldur sukursjúklinga, tá ið sjúkuavgerðin varð gjørd.*

| | | ♂ | ♀ | | | ♂ | ♀ |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20–29 ár | 2 | (1 | 1) | 50–59 ár | 3 | ( | 3) |
| 30–39 = | 3 | (1 | 2) | 60–69 = | 5 | (3 | 2) |
| 40–49 = | 1 | ( | 1) | 70–79 = | 3 | (1 | 2) |

Tíggju av teim seytjan fingu insulin, hini ikki. Sjúkuviðgerðina verður ikki skrivað um her: hon er sjálvandi ikki øðrvísi her enn aðrar staðir.

Fimm av teim 17 sukursjúklingunum høvdu týðuligan adipositas, vóru ovurfeit, og tveir av hinum vóru tætt við ovasta mark á rættari vekt. Uppi í hesum er niðanfyri nevnda genta við dystrophia adiposo-genitalis (vekt 130 kg), og sum doyði av beinkrími í 1951.

Av teim 17 sukursjúku vóru 2 systrar, eina ferð bróðir og systir og eisini móðir og sonur. Har afturat fleiri, ið vóru skyld sínámillum, men longur burtur, ella við hesi nevndu seks. Maðurin við glycosuria renalis og bróðursonur hansara, ið hevði diabetes mell., mugu vit eisini nevna í hesum sambandi.

Av teim 17 folkunum við sukursjúku doyðu 7 (2♂, 5♀) undan $^{26}/_{6}$ 1952. Teirra millum ein genta, sum doyði 38 ára gomul í einari beinkrím-farsótt. Deyðaváttanin varð soleiðis útfyllt: Influenza — vardi í 4 dagar; tumor cerebri (cranio-pharyngeom) vardi í minst 16 ár; diabetes mell. — vardi ið hvussu er í 11 ár. Aftur at hesum kundi verða lagt dystrophia adiposo-genitalis. Ein av hinum seks, 64 ára gamalur maður, doyði av bronchopneumonia. Trý vóru 70—79 ára gomul og tvey ímillum 80—89. Hjá 4 av teim 7 høvdu leikmenn verið líkskoðarar. Tann 26. juni 1952 livdu so í Eiðis læknadømi 10 fólk við sukursjúku. Íbúgvaratalið var tá her tætt uppundir 2300, sum vóru $^{1}/_{14}$ av øllum fólkatalinum í Føroyum. Hevur sjúkan somu útbreiðslu um alt landið sum her, verður talið á sukursjúkum: 140 av 32000, sum er alt fólkatalið. T. e. 4,4 uppá hvørjar 1000 íbúgvar.

Er hetta talið — 4,4‰ — stórt ella lítið tal?

Danmark hevur 7 rannsóknir viðvíkjandi útbreiðslu sukursjúkunnar. Tær fara náttúrliga í 2 bólkar: Tær 4 fyrstu eru prentaðar í árunum ímillum 1921 og 1929; hinar tríggjar í tíðini 1950—1953.

Rannsóknirnar hjá *Johan Kaas* í 1921[7] vóru tær fyrstu. Ein part av fyrra verðaldarbardaga høvdu sukursjúk særrætt til at fáa uppískoyti til smør- og fleskaskamtin. *Kaas* helt seg til kortini frá 1. árshelmingi av 1918 og fann 1070 sukursjúk í Keypmannahavn og Frederiksberg. Hann er tó ikki heilt vísur í, at hetta talið er rætt, men heldur at hetta er ímillum 1000 og 2000 og helst nærri seinna talinum. Við fólkateljingina hin 1. februar 1916 høvdu báðar kommunur høvuðstaðarins tilsamans 605.772 íbúgvar. Taka vit nú talið 1070, verða hetta 1,8‰ sukursjúk.

*Søren Hansen*[4] kannaði bøkurnar yvir verjuskyldugar unglingar fyri 3 ár — og mundi helst vera árini 1923, 24 og 25 — og fann 28 sukursjúkar sum allir vóru yvir 20 ár. Burtur úr tølunum hjá Kaas viðvíkjandi sukursjúkum mannfólki á ymsum aldri í Keypmannahavn og Frederiks-

berg, roknaði hann talið á sukursjúkuni fyri hvørji túsund mannfólk um alt landið og fekk 2,2⁰/oo.

*K. A. Heiberg* og *Poul Heiberg*[5] nýttu sum grundarlag undir útrokningum sínum ein sjúkrakassa í Leipzig. Her kendu teir lutfallið ímillum sjúk og deyð av sukursjúku á ymsum aldri. Hevur sukursjúkan í Danmark somu út= breiðslu, sum hon hevur millum sjúkakassalimir í Leipzig í Týsklandi — men tað hava vit valla loyvi til at halda — so er lætt at rokna út talið á sukursjúkum í Danmark eftir teim kendu tølunum frá Leipzig. Teir funnu slaka 1⁰/oo.

Í 1927 sendi hagfrøðistovan hjá heilsustjórnini spurnar= bløð til allar læknar landsins og bað teir siga, hvussu mangar sukursjúkusjúklingar hvør einstakur teirra hevði undir hond hin 1. sept. tað árið. *Robert Nielsen*[10] kann= aði innkomnu svørini. Stívur fjórðingur svaraði ikki aft= ur. Teljingin vísti 1,2⁰/oo.

Tá ið *Johan Kaas* savnaði smør= og fleskakort frá 1. helmingi av 1918, royndist, at tey sukursjúku av bygd= unum høvdu nýtt hetta serloyvi ógviliga lítið. Tey fingu nóg mikið av feitum á annan hátt. Í seinna veraldarbar= daga fingu sukursjúk særskamtan av søtievni, og meðan tað var ógjørligt at fáa hesi evni á annan hátt, tóku uttan iva at kalla øll við hesum tilboði. *Karen Dreyer* og *Alfred Hey*[3] bygdu á tølini á teimum, sum í tíðini 1/2 1944—20/10 1948 høvdu fingið tílíka særskamtan, og gjørdu úr= slitið upp hin 1/7 1946, hesin dagur liggur mitt í tíðar= skeiðinum. Og úrslitið varð 4,3⁰/oo — tilsamans o. u. 18000 — av øllum fólkatalinum. Hjá *Drejer* og *Hey* er at finna talið á sukursjúkum fyri hvørjar 1000 íbúgvar í hvørjum einstakum donskum amti. Bornholm hevði 4⁰/oo.

Føroyar — sum ávíst frammanfyri — 4,4⁰/oo.

*Poul Horstmann*[6] taldi í Odense amti hin 1. des. 1949 við spurnarbløðum til allar læknar í økinum. Úrslitið varð 4⁰/oo. *Horstmann* vísir, at fólkið í Odense amti kann sig= ast at vera eyðkendur úrskurður úr øllum fólkinum í

Danmark. Um alt landið áttu so henda dagin at hava verið ógviliga nær við 16000 sukursjúk.

*Jørgen Christensen*[2] taldi hin 1. okt. 1950 í Vejle amti við spurnarbløðum til allar læknar í amtinum. 3,6⁰/oo av øllum fólkinum høvdu henda dag sukursjúku. Eisini hann fann, at talið á sukursjúkum í øllum landinum lá um 16000.

Av tí, ið omanfyri er nevnt, síggja vit, at tølini frá teimum fyrstu rannsóknunum, sum eru um tíðina 1918—1927 og vórðu prentað í árunum 1921—1928, eru smá. Størsta talið er 2,2⁰/oo, og tað er bert fyri mannfólk. Næsthægsta talið er 1,8⁰/oo, og tað er talið á sukursjúkum í Keypmannahavn. Hini tølini eru ikki lítið lægri: 1,2 og sløk 1⁰/oo. Tølini frá árunum 1946—1950, prentað í 1950 og 1953, eru 2, 3, 4 ferðir so stór: 4,3—4,0 — 3,6⁰/oo. Í fyrstu rannsónunum eru fleiri mannfólk, men frá og við 1927 hava konufólk munin.

Í Eiðis læknadømi eru í árunum 1931—1952 11 konufólk og bert 6 mannfólk.

Eru hesi tøl bein, benda tey á mikla øking av sukursjúkum í Danmark í árunum 1918 til 1950, og eini broyting í lutfallinum ímillum kynini. Sukursjúkan tykist við øðrum orðum fyri ein part at vera broytt í hesum 32 ára tíðarskeiðinum. Insulinið, ið kom fram í 1923, eigur kanska ein part av skuldini: sukursjúk liva longur nú enn fyrr; men eisini onnur viðurskifti mugu hava gjørt um seg.

Úrslitið av hesi rannsókn verður so, at sukursjúka í nútíðini er eins víða um í Føroyum sum í Danmark. Føroysku tølini eru 4,4⁰/oo, og 3 seinastu donsku rannsóknirnar vísa 4,3—4,0 — 3,6⁰/oo.

Diabetes mell. kann næstan sigast at vera nýggj sjúka í tí partinum av Føroyum — norðara parti av Eysturoy og Streymoy — sum leita til lækna á Eiði. Rætt er tað, í 1914 doyði eitt konufólk av sukursjúku, men hon var flutt inn í hetta økið; og so kenna vit linan tilburð í 1921, men hann hoyrir av grundum sum omanfyri eru greindar,

als ikki upp í tey sukursjúku í Føroyum. Taka vit ikki hesi bæði konufólkini við, var fyrsti tilburður av diabetes mellitus í 1931, og stív 21 ár seinni búðu 10 sukursjúk í hesum økinum, har fólkatalið var bert 2300; og í hesum tíðarskeiði vóru sjey, sum høvdu hesa sjúku, tá ið tey doyðu. Henda sterka øking tykist at halda fram. Í teim⸗um trimum árunum eftir $^{26}/_{6}$ 52 eru komnir 3 nýggir sukursjúkusjúklingar í Eiðis læknadømi: 2 mannfólk, sum vóru 52 og 68 ára gomul, tá ið sjúkan var avgjørd, og eitt 81 ára gamalt konufólk við cancer pancreatis og diabetes mellitus. Eingin doyði av teimum 10 sukursjúku, sum livdu har omanfyri nevnda dag. Tilsamans vóru tí $^{26}/_{6}$ 1955: 13 tilburðir. Her skal tó verða tilskilað, at 81 ára gamla konufólkið doyði í juli 1955.

Rokna vit við 12 sukursjúkum í Eiðis læknadømi í 1955, fáa vit 5,2‰ fyri allar Føroyar; rokna vit við 13, fáa vit 5,7‰. *Dreyer* og *Hey* roknaðu út sukursjúkutalið fyri hvørjar 1000 íbúgvar ikki bert fyri Keypmannahavn, Frede⸗riksberg og Gentofte, men, sum longu nevnt, eisini fyri hvørt einstakt amt í Danmark hin $^{1}/_{7}$ 1946. Seta vit før⸗oyska talið til 5,2 høvdu bert 2 av hesum býum og amt⸗um fleiri sukursjúk enn Føroyar, og tað vóru Frederiks⸗berg og Århus við ávikavist 5,7 og 5,5‰. Taka vit 5,7‰ sum mynd fyri útbreiðslu sukursjúkunnar í Føroyum — og hetta var veruliga sukursjúkutalið hin $^{26}/_{6}$ 1955 — hev⸗ur einki øki í Danmark hægri tal.

Atvoldin til henda ógviliga bráða vøkstur sukursjúkunn⸗ar er ivaleyst ein ógviliga týðilig broyting í føðini. *J. C. Svabo*[11] skrivaði 1781—1782 gjølla um matin. Tað sama gjørdi *Jørgen Landt*[8], prestur í Føroyum frá 1791 til 1799, og *A. Berg*[1], lækni í Suðuroy 1862—1869. Matnýtslan í hesum báðum 7—8 ára longu tíðarskeiðunum er heilt onn⸗ur, enn hon er í dag — fyrst og fremst við nógvar ferðir størri mongd av kolvætu.

*Landt* sigur at tilkomið fólk fær hvønn dag $^{1}/_{2}$ drýl, og hann sigur, at av $^{1}/_{6}$ skeppu (1 kannubæra) av byggmjøli

kunnu verða bakaðir 3 drýlar. *Berg* skrivar: «Da nu 1/6 skæppe bygmel kan antages at veje c. 2 1/2 pund, vil 1/2 brød kun veje c. 1/2 pund». t. e. 250 gram. Hann er bakaður av o. u. 219 g av mjøli. Tí eftir frágreiðing *Bergs* kunnu verða bakað 8 pund av drýli úr 7 pundum av mjøli. Aftur at drýlinum mundu tey ivaleyst fáa eitt sindur, men ógviliga lítið, av aðrari kolvætu í greyti og tunnari mjølsúpan, sum varð sopin ella drukkin 1–2 ferðir um dagin. Har afturat í hoyna og um høgtíðir tummatjúkkar rugkøkur, og um heystið kókaðar røtur (turnips). *Landt* hevur eitt lítið petti um epli, og vit síggja av tí, at eplavelting var ikki vanlig í hansara tíð. Tøl eru eingi, men vit fara neyvan skeivt, tá ið vit siga, at epli tá høvdu lítið at týða í føroyska húsarhaldinum. Hetta hóskar væl við tað ið *Svabo* skrivar í 1781–82, 10 ár áðrenn *Landt* varð prestur í Føroyum.

Eftir *Bergs* bók fekk hvørt fólk – vaksin eins og smábørn – í árunum 1858–60 161 pund av drýli yvirhøvur um árið; og tað samsvarar við 220 g um dagin, ella 192 g av mjøli. Fólkatalið var hin 1. okt. 1860 8922[13]. Tøl *Bergs* (220, 192) eru so at siga heldur smærri enn *Landts* (250, 219); men munurin er lítil, og ikki er at gloyma. at útrokning *Landts* er bert fyri vaksin. Tøl *Bergs* vísa afturímóti drýla- og mjølnøgdina hjá øllum íbúgvunum o. u. 70 ár seinni. Tað er orsøk til at halda, at drýlanøgdin yvirhøvur veruliga var størri í seinna tíðarbilinum enn í tí fyrra. *Berg* sigur okkum m. a. alla kornnøgdina, sum nýtt verður í Føroyum hvørt ár yvirhøvur í tíðini 1858–1860. Nærum fjórðungurin varð veltur her. Hann tykist ikki hava tikið sáðkornið frá; tí verður ein lítil villa, sum ger tað, at drýla- og mjølnøgdin (220, 192) verður í hægra lagi. – Men henda villa javnast aftur við tað, at *Berg* hevur sett vektina á føroyskum drýli heldur høgt til «ca. 1/2 pund», sum her er roknað til 250 g.

Aftur at *Bergs* tølum mugu vit taka eitt kolvætumikið føðievni, sum var nærum ókent á *Landts* døgum: eplini.

*Berg* sigur okkum, at í 1851 vórðu veltar 5137 tunnur av eplum, men hann sigur einki um eplavelting í 60-árunum, tá ið hann var í Føroyum. Úrtøkan úr eplaveltingini í Føroyum er misjøvn á ymsum støðum; hon man sum oftast geva 6-faldan eplavøkstur. Setepli verða at taka frá, og tað verða 658 tunnur. Tað verða so bert 4281 tn. til nýtslu í húsarhaldinum. Í Føroyum vóru við fólkateljingina hin 1/2 1850 8137 fólk[14]. Seta vit eina tunnu av eplum til at viga 100 kg., verða 144 g av eplum til hvørt fólk um dagin.

Vit síggja, at í fyrru helvt av 19. øld kom eitt sindur av eplum aftur at tí dagligu føðini hjá hvørjum einstøkum, — 144 g um miðjuna á øldini. Og eyðvitað vóru í Bergs tíð onnur kolvætu enn mjøl og epli í tí dagliga matinum hjá fólkinum í Føroyum. Hvørji hesi hava verið og hvussu nógv, gevur bókin okkum ongar upplýsingar um. Men tað er uttan iva rætt, tá ið sagt verður, at hetta hava verið tey somu evni sum í *Landts* tíð og at kalla í somu nøgd.

Fara vit nú 70—80 ár fram í tíðina, til árið 1935, síggja vit at hvør einstakur íbúgvi í Føroyum — tilkomin eins væl og smábørn — yvirhøvur fekk 343 g av breyði um dagin, bakað úr 300 g av mjøli. Aftur at tí koma ikki minni enn 389 g av eplum — ein partur veltur í Føroyum, og ein partur fluttur inn. Fólkatalið var hin 5. nov. 1935 25744[12] og ein tn. av eplum er sum oman fyri nevnt sett til 100 kg. Seteplini eru drigin frá. Aftur at hesum báðum tølunum fyri breyð og epli koma mong onnur kolvætumikil føðievni, og í stórari nøgd: Ertrar, havragrýn og onnur grýn, skipsbreyð, «bisquits», gularøtur, appelsinur, súrepli, rosinur, sviskur, blommur, søtimeti, siroppur, sjokulata, marmulata o. m. a., og ómetalig nøgd av sukuri. Bert av sukuri varð flutt inn so nógv, at tað verða 128 g til hvønn einstakan um dagin.

Talið 128 tykist ófatiliga stórt, men er uttan iva beint. Alt hetta sukur kemur sjálvandi ikki á borðið sum sukur.

Rættiliga stórur partur fer til bakaravirki og ídnað, men at endanum kemur tað sjálvandi, um tað so er umvegis, í føroyska heimið og verður etið av fólkinum har. Á 2. talvu er yvirlit yvir kolvætu í føðini hjá Føroyingum í tíðarskeiðinum 1791—1935.

*2. talva. Kolvætumikil føðievni í grammum í dagliga føroyska matinum í tíðarskeiðinum 1791—1935. Har einki er skilað til, galda tølini nøgdina yvirhøvur til hvørt einstakt fólk.*

| | *Breyð* | *Epli* | *Sukur* | *Onnur kolvæta* |
|---|---|---|---|---|
| 1791—98 | 250 (til hvørt tilkomið fólk) | Smáar nøgdir | | Smáar nøgdir |
| 1851 | | 144 | | |
| 1858—60 | 220 | | | Smáar nøgdir |
| 1935 | 343 | 389 | 128 | Ógviliga stórar nøgdir |

Vanligt man vera at halda, at tað ikki er sjúkan sjálv — diabetes mell. — men eitt dulgt ættarbregði sum verður arvað. Hetta hóskar væl við tað, vit kunnu læra av fyrstu framkomu sukursjúkunnar í tí kannaða økinum. Tær ættir, sum nú búgva her, eru yvirhøvur tær somu, sum her hava livað í langt tíðarskeið — mangar øldir. Av teim 17 sukursjúku, sum fingu sjúkuna í tíðarskeiðinum 1931—$^{26}/_{6}$ 1952, er bert ein, sum er føddur uttan fyri kannaða økið — í grannabygd — øll hini í økinum. Føðin hjá Føroyingum hevði til o. u. 1860, og uttan iva ikki fá ár longur, so lítla nøgd av kolvætu, at hon í mongum førum var sukursjúkuføði. Hon var beinleiðis gagnlig honum, ið lyndi hevði til sukursjúku. Føðin helt sjúkuni niðri, so at hon slapp ikki fram. Men føðin broyttist við og við, so at hon í 1935, og ivaleyst eisini fyrr, kom til at hava í sær ómetaligar nøgdir av kolvætu, sum so fekk sjúkuna fram. Her er orsøkin til, at so nógv sukursjúk eru í Føroyum.

## SUMMARY

The first known case of diabetes in The Faroe Islands was recorded in the year 1883; the next case in 1906. From thence onward to 1920 16 deaths were recorded. The author has been practitioner in the medical district of Eiði from june 1920 to june 1952 at which latter year there were 2300 inhabitants in the district, and before those 32 years only one person here, a woman, has suffered from diabetes; she died of this disease in 1914, 40 years of age. The next case occured in 1931 and from 1931 to 1952 17 persons were suffering from diabetes in the medical district of Eiði. Ten of those cases were still living in june 1952. If this disease had the same spread over all The Faroe Islands – and this is true – the 10 cases of Eiði medical district in 1952 would answer to 140 diabetic patients in the Isles which is 4,4 pro mille.

There is every reason to believe that this explosive growth of diabetes is due to a very profound change in the diet of the inhabitants during the past 150 years. In 1791–98 there were no potatoes in The Faroe Islands. The ration of bread was about 250 grams for an adult. In 1858–1860 ration of bread and potatoes for every inhabitant was respectively 220 and 144 grams. In 1935 the amounts were 343 and 389 grams, hereto must be added large quantities of other carbohydrates which can not be weighed or stated.

## BÓKMENTIR

1. *Berg A.:* Bidrag til kundskab om Færøerne. Nykøbing S. 1889.
2. *Christensen, Jørgen:* Ugesk. f. læger 1953, *115:* 528.
3. *Dreyer, Karen & Alfred Hey:* Ugesk. f. læger 1953, *115:* 1069.
4. *Hansen, Søren:* Glykosuri og psykose. Ugesk. f. læger 1926, *88:* 127.
5. *Heiberg, K. A. & Poul Heiberg:* Acta med. Scandinav. 1925: Vol. *LXII,* 126.
6. *Horstmann, Poul:* Ugesk. f. læger 1950, *112:* 1437.
7. *Kaas, Johan:* Bibliot. f. læger 1921, *113:* 231 og 273.
8. *Landt, Jørgen:* Forsøg til en beskrivelse over Færøerne. Kbhn. 1800.
9. *Lund, N. Chr.:* Iagttagelser fra Færøerne, navnlig angående epidemiske sygdomme. København 1884.

10. *Nielsen, Robert:* Ugesk. f. læger 1928. *90:* 850 (sí eisini 1927, *89:* 921.)
11. *Svabo, J. C.:* Føroyaferðin 1781–1782. Varðin. Tórshavn 1924, (sí annars hin óprentaða partin av tí upprunaliga handritinum).
12. Danmarks statistik. Færøernes befolknings- og erhvervsforhold. Kbhn. 1937.
13. Folketællingen på Færøerne 1. okt. 1860.
14. Folketællingen på Færøerne 1. februar 1850.